

# HÁRMÓTIN Í DAG

Hvat er hármóti nú? Hvør skapar mótan? Hvørjir litir eru frammi? o.s.fr. M.a. hesar spurningar settu vit Elnu Strøm, ið skipaði fyri hármóta showinum á Hotel Føroyum mánadagin 21. november

**HÁRMÓTI**
**Barbara Tausen**
**Lena R. Guttesen**

Í mong ár hava frisørar havt hármótashow í Føroyum. Í ár var tað so Elna Strøm, ið skipaði fyri. Hon hevði fingið ein mann, ið arbeiddi hjá L'Oreal at undirvísa, saman við einum øðrum, ið hevur eina salong í Keypmannahavn. Báðir vóru teir úr Danmark.

Showið var sera væl umtókt, eini 50-60 frisørar vóru komnir at síggja, hvat hesir vælroyndu menn høvdu at sýna fram. Teir søgdu frá ymiskum vørum –hvat er gott og ikki, kundaundirvísing, og so høvdu teir eisini klipt og litað nøkrum føroyskum modellum, so fólk kundu síggja hvat nú kemur fram. Tað vera tær reyðu blommulitirnar, ið frisøranir skula hava á hillini. Stutt, hæddir –lætt klipt hár.

Mótin kemur mest úr Londum. Vidal Sossoon og Tony & Guy eru millum fremstu hármótaskaparunum í heiminum. Elna sigur eisini, at alt sum áður hevur verið vandamikið, sigst í dag at vera røkjandi –við at bøta um tey, gerast tey betur og betur. At enda sigur hon, at tað ikki altíð er líka lætt at finna modellir til tílík hármótashow, tí man skal tora væl, og tora at taka ímóti broytingum. –men hóast tað, eru nógv ung, ið vilja vera provokerandi og prøva okkurt vilt.









